

*Skúlin hevur lagt stóran dent á at innrætta felagshølini, so næmingar trívast og kenna seg væl*







# Nám X

**Vit hava prátað við nakrar næmingar, sum høvdu fríkorter og sótu úti í gongini. Summi sótu í sofunum og teknaðu, onkur tosaði, nøkur fingust við teldur, og onnur spældu borðfótbólt. Hetta tóktiskt at vera eitt sera vælskipað og hugnaligt umhvørvi**

Anna Sjóvará og Maibrit Andreasen

## Tímir nógv betur í skúla

**Rói** hevur áðrenn gingið í Venjingarskúlanum.

– Mær dámar sera væl skipanina í Nám X, og tað er gott at øll samlast á einum stað. Nám X er betur enn vanlig skúlagongd, og nú dámar mær nógv betur at ganga í skúla enn fyrr.

Rói hevur valt ítróttarbreyt og náttúrubreyt. Í náttúrubreytini hava tey m.a. alis-og evnafrøði, og tey læra nógv um náttúruna, og hann heldur hetta vera sera spennandi.

Eins og hini sigur Rói, at í 9. flokki fingu tey sera nógva kunning um Nám X, og hann valdi hetta fyri at fyrireika seg til at fara víðari.

## Kann velja eftir áhuga

**Harriet** hevur áður gingið í Kommunuskúlanum.

– Mær dámar nógv betur at ganga í skúla nú enn í 9. flokki, tí at í Nám X kanst tú velja lærugreinir, sum tú ert áhugaður í og tímir at arbeiða við, og undirvísingarhátturin er sera góður.

Hon valdi at fara í Nám X, tí tað ljóðaði spennandi, og ein kann serkunna seg meira innan fyri eitt ávíst øki. Eisini er tað meira avslappandi.

– Í 9. flokki hava vit eisini fingið nógv at vita um Nám X, og eg mæli øðrum til at fara í Nám X, tí tú kanst gera tað, tær dámar, sigur Harriet.

## Alt er positivt

**Kirstin** hevur gingið í 9. flokki í Eysturskúlanum.

Henni dámar sera væl at ganga í Nám X, tí øll eru samlað, og tú kanst velja lærugreinir eftir áhuga.

Kirstin hevur valt náttúrubreyt og kost-og heilsubreyt, og hon heldur, at hon lærir sera nógv av hesum og kann brúka tað víðari í lívinum.

– Alt er positivt við Nám X. Tað er sera stuttligt, og eg ráði øðrum til at gera tað sama.

## Nám X er kul

**Ása** hevur gingið í 8 flokki í Eysturskúlanum og fór síðani á eftirskúla í 9 flokki.

– Í Nám X hava vit nokkso fríar teymar, og tað er avslappandi. Eg haldi, at tað er kul, at øll samlast, og nú tími eg nógv betur at ganga í skúla.

Hon sigur, at tað er sera ymiskt, um tímarnir eru fyrireikaðir ella ikki. Og endar við at siga. -Eg haldi at øll skulu royna hetta, tí tað er kul.

## Ein góður og øðrvísi skúli

**Maria** hevur gingið í 9. flokki í Kollafjarðar skúla.

– Eg haldi, at Nám X er nógv meira øðrvísi enn vanlig skúlagongd. Nú eru nógv fleiri næmingar, og tú velur sjálv/ur lærugreinarnar.

Ein av breytunum, hon hevur valt, er kost-og heilsubreyt. Har gera tey mat og røra seg og læra nógv um heilsu og um góðan mat. - Eg valdi hesa breyt, tí hetta er nakað, sum eg kann brúka alt lívið, sigur Maria við einum smíli.

Av tí at skúlin sparir og lærarir til Nám X ikki eru tøkir, fáa næmingarnir ikki vikar, um teirra lærari er sjúkur, og tað heldur Maria vera keðiligt.

– Eg valdi at fara í Nám X, tí eg visti ikki, hvat eg vildi. Vit fingu nógv at vita um Nám X í 9. flokki og eg helt, at tað ljóðaði sera spennandi. Nám X er betri enn eg hevði væntað, og eg mæli eisini øðrum til at royna hetta, sigur Maria.